




# Vánaligt lógarsmíð og vantandi lógarpolitikkur



Val X

JACOB VESTERGAARD

Fólkaflokkurin

Dimmalætting umrøður í blaðnum fríggjadagin 11. januar ein vaksandi trupulleika, sum politiska skipanin ikki longur kann loyva sær einki at gera við. Hesin er vánaliga ella dalandi góðskan í sambandi við lógar- og kunngerðarsmíð. Uttan at taka undir við øllum, so er ein kjarni av sannleika í tí, sum verður lýst í Dimmu.

Í 2004 metti umsitingin í Innlendismálaráðnum, at vegleiðingarnar, ið vórðu sendar hinum ráðunum í sambandi við lógararbeiði høvdu gagnliga ávirkan á lógaruppskotini, sum samsvaraðu alt betri og betri við tann leist, ið Innlendismálaráðið mælti til.

Tíverri er tað ein sannroynd, at seinasta samgonguskeiðið hevur gingið heldur skjótt afturá við góðskuni á lógaruppskotunum. Ein orsøk til hetta er helst, at størri og størri partur av lógaruppskotunum verða evnað til av øðrum enn løgfrøðingum, og at politiska skipanin eftir øllum at døma ikki sær hetta sum ein trupulleika. Besta dømið um tað man støðan í Almanna- og heilsumálaráðnum vera, har einstakir og heilt niður til hálvir løgfrøðingar hava havt ábyrgdina av at gera lógar- og kunngerðauppskot á hesum stórsta økinum í allari umsitingini.

Men eitt ráð sum Almanna- og heilsumálaráðið eigur ikki at fáa alla skuldina. Vit onnur, ið hava umsitið hini ráðini, mugu eisini taka okkara part av ábyrgdini. Eitt nú kann vera víst á, at Fíggjarmálaráðið hevur eina sera stirvna praksis, tá ræður um at flokka almenn størv. Helst man eitt ráð sum Almanna- og heilsumálaráðið líða undir hesum, at stirvnar innanhýsis fyrisitingarligar reglur og mannagongdir forða fyri, at nóg nógv og nóg attraktiv størv kunnu verða stovnað í hesum illa sperda ráði. Varð trupulleikin sæddur út frá hesum sjónarmiðnum, vildi stórur partur av trupulleikanum við lógargóðskuni í nevnda ráði kunnað verðið loystur.

Ein onnur orsøk til trupulleikan við lógargóðskuni er eisini, at aðalráðini í alt minni mun fylgja teim mannagongdum og vegleiðingum, ið eru galdandi á økinum. Enn ein orsøk er tann vælkenda støðan, ið er trupul at sleppa av við, har politiska leiðslan og fyrisitingin leggja so nógv uppskot sum gjørligt fyri tingið beint áðrenn, tingsetan endar, við tí avleiðing, at uppskot verða skrumblað í gjøgnum uttan eftirkanning, og uttan at freistir verða hildnar.

Eg havi sum landsstýrismaður í lógarmálum ávarað móti hesi óhepnu gongd og á landsstýrisfundi fyri tíð síðan víst á vaksandi trupulleikan. Kortini mugu vit ásanna, at støðan tykist at versna. Stóra talið av lógaruppskotum, ið varð lagt fyri løgtingið langt inn í november mánað, har nógvu av uppskotunum vóru so sein ávegis, at tey ikki náddu til løgfrøðiligt eftirlit í Innlendismálaráðnum, ber boð um støðuna.

**Vit kunnu venda gongdini**

Lógir og kunngerðir ávirka allar borgarar og øll samfelagsviðurskifti. Tí er sjálvsagt, at vit støðugt mugu stremba eftir, at lóggáva okkara er skynsom, væl umhugsað og yvirhøvur hóskandi til okkara viðurskifti. Umframt at løgfrøðiligur serkunnleiki er ein fyritreyt, er góð fyrireiking og umsitingarligir karmar grundleggjandi fyri at fáa eitt dygdargott lógarverk. Hetta mugu politikararnir vita og virða.

Vit kunnu hava ymiskar meiningar um, hvørt vit hava lógir um ov nógv viðurskifti ella ikki, men at seta onnur enn løgfrøðingar til at gera løgfrøðiligt arbeiði svarar til at seta maskinmann til handverksarbeiði. Hetta vil sum frá líður fáa størri og størri avleiðingar fyri lógarsmíðið og kann koma at kosta borgarum og samfelagnum dýrt.

Eitt annað stað at seta inn ímóti dalandi lógargóðskuni er løglistin, ið er tengdur at ólavsøkurøðu løgmans. Hesin listi hevur yvirlit yvir øll lógaruppskot, ið landsstýrið ætlar at leggja fyri tingið komandi árið. Trupulleikin er tó, at hesin listi er eitt slag av avrikslista hjá ymisku landsstýrisfólkunum, ið helst vilja hava so nógv uppskot á listan sum gjørligt fyri at vísa sítt arbeiðssemi. Her mugu vit hava í huga, at dygdargott lógarsmíð tekur tíð, og at vit seta okkum sum mál at gera løglistan so realistiskan sum gjørligt heldur enn so langan sum gjørligt. Eg er sannførdur um, at hetta kundi bøtt um støðuna.

Ein styttur løglisti tryggjar kortini ikki betri lógir. Hugburðurin má broytast, so leiðbeiningarnar um uppseting av lógum og um krøv til viðmerkingar til lógartekstin verða fylgdar. Fleiri vegleiðingar mugu eisini fáast til vega, og verandi vegleiðingar mugu uppdaterast í neyðugan mun.

**Undirvísing í løgfrøði má skipast beinanvegin**

Sum víst á í viðmerking nýliga, eigur løgfrøðiundirvísing at verða skipað á Fróðskaparsetrinum. Slík undirvísing og útbúgving verður helst minni eindarkend enn kenda danska útbúgvingin, og vil løgfrøðiligur førleiki tí lættliga kunna koma enn fleiri persónum (eisini í fyrisitingini) til góðar enn nú. Avleiðingin verður helst, at løgfrøðiligur førleiki verður mentur millum føroyingar, og sannlíka avleiðingin verður eisini betri lógarsmíð. Hetta umframt tann sjálvsagda fyrimunin, at gróðrarbotnur verður skaptur fyri gransking innan serføroysk lógarøki.

**Ein almennur lógarpolitikkur má vera**

Ein lógarpolitikkur eigur eisini at verða orðaður, har m.a. endamál og ítøkilig tiltøk eiga at verða lýst. Lógarpolitikkurin eigur natúrliga at taka støðu til tvørgangandi spurningar um lógarsmíð, so sum krøv til fyrireiking, innihald, revsireglur, málburð og uppseting.

Samanumtikið má lógarpolitikkur, lógargóðska og akademisk menning innan løgfrøði sigast at hoyra til nøkur av høvuðsmálunum, ið komandi Løgting og samgonga eiga at raðfesta.

# Kveikjara íverksetarar



Val X

RODMUNDUR NIELSEN

valevni Fólkaflokksins á Lista A, sjálvandi!

Tað er av størsta týdningi at samskipa og at gera eitt stað har tú kanst avgreiða øll tíni viðurskiftir so at tú kemur skjótt og lætt í gongd sum sjálvstøðugur vinnurekandi. Skipanin í dag við at renna frá Peri til Pól er ikki sera hugagóð hjá nýggjum eldsálum.

Tað átti at borið til á einum stað í landinum at fingið avgreitt øll viðurskiftir, tá ið farið verður undir eina nýggja vinnu. Her hugsi eg um skráseting av nýggjum felagi, mvg viðurskiftir, handilsloyvi, v-tal og so víðari.

# Flakavirkið heiman á Sandi



Val X

GERHARD LOGNBERG

løgtingsmaður, Javnaðarflokkurin

Sandoy og Sandsbygd eru í einari spentari støðu, hvat hendur fyri tíðina. Tað hoyrdist at flakavirkið á Sandi bleiv lagt stilt eina tíð, tí marknaður ikki var fyri saltfiski. Hesa støðu góðtóku fólk so nøkunlunda.

Men nú er støðan heilt ein onnur, stórir bilar byrja at koyra maskinur út av virkinum.

Hartil er at siga, um tað ikki loysir seg at flekja heiman á Sandi so loysir tað seg heldur ikki at flekja í Suðri.

Vælsignaðir tit, sum eiga hesi virkir, geri ikki tað ger, at tit nú loypa frá hesum virkjum og tøma tey.

Vit í Sandoynni hava verið og eru glað fyri at tit komu til oynna. Sandoyggin rætti tykkukm bróðurhond tá tit komu, arbeiðarafeløgini setti pening til og onnur, so gott tey kundu. Eisini kom landi við sínum báðum milliónum.

Vit vita væl at tit eiga vrikini á leiðaðum lendi.

Vælsignaðir lati hetta ikki enda við tí stríði, sum tók seg upp ímillum Skopunar Kommunu og Sólaris, tí vit hava havt sera gott samstarv við Delta.

Men men vit fara ikki bara at hyggja meðan arbeiðstólini á virkinum verða fragta til aðrar oyggjar, hetta virkið er livibreyði hjá nógnum í Sandoynni.

Um neyðugt fer Sandoyggin at standa saman og vil eg heldur enn gjarna vera stavnamaður í hesu søk.

So tit sum stjórna hesum virkjum, lati okkum brúka tað besta amboði, at tosa saman, tí vit góðtaka ikki at tey tól, sum vóru stuðla fíggjarliga til Sandoynna nú fara út um bogan í myrkri og førast í aðra oyggj.

Sandoy, Sandoyingar lati okkum standa saman at náa tað besta. Vit góðtaka ikki at Sandoyggin fær banahøggi, við at steingja virki, fyri at menna annað øki við maskinum, sum vóru stuðlaðar til Sandoynna.

# Fleiri pengar til heilsuverkið, men hvat er innihaldi?



Val X

HEIDI PETERSEN

Tjóðveldi

**Krónuupphæddin økt**

Ávísur flokkur setir seg fram sum garant fyri at borgarin fær tað tænastu frá heilsuverkinum sum honum tørvar, tí teir hava nýtt fleiri pengar enn undanfarin ár uppá heilsuverkið. Men her verður ikki eitt orð sagt um innihaldi í tænastuni til borgaran. Øll vita at krónuupphæddin á botnlinjuni ongan grøðir og at allir politiskir flokkar arbeiða fram ímóti at gera eitt dygdargott heilsuverk, men hvat er innihaldið?

**Dygdargóða sjúkrahúsviðgerð.**

Innihaldi í heilsuverkinum eigur at byggja á at seta góðskumettar mannagongdir á stovn,har dygdin í viðgerðini allatíðina mennist og sum tryggjar sjúklinginum røttu viðgerðina, innihaldi í heilsuverkinum er ein skipan har sjúklingurin allatíðina verður settur í sentrum og út frá tørvinum hjá tí einstaka fer viðgerðin fram.

**Eftirútbúgving og trivnaður á dagsskrá.**

Heilsurøktarfólkið í sjúkrahúsverkinum fær tíð til at útinna ta røkt sum sjúklingurin hevur tørv á og møguleikar allatíðina at menna seg innan sítt fakøki. Eftirútbúgving og trivnaður á arbeiðsplássinum eru treytin fyri at fáa heilsutænastuna til borgaran so trygga og góða sum til ber.

Hetta er í øllum førum tað heilsuverk eg vil berjast fyri skal gerast veruleiki í Føroyum, og við slíkum tænastum, har borgarin er í sentrum, veruliga seta Føroyar á heimskortið.

X við E

Heidi P

Les meira á www.tjodveldi.fo/heidi